# fáa



## FAKTA UM FØSTUNA

- Føstan stavar frá gamlari katólskari tíð, og verður hildin til minnis um Jesu líðingar
- Føstulávint eitur á fremmandum málum Carne-val , sum merkir "farvæl til kjøt"
- Føstan er tíðin frá øskudegi til páskaaftan, stundum roknað frá sunnudegi í føstuinngangi
- Orðið "føsta" kemur av sagnorðinum "at fasta"
- At fasta er hvørki at njóta mat ella drekka
- Í Føroyum var føstan tó í høvuðsheitum avmarkað til ikki at eta kjøt
- Sagt varð, at "grýlan kemur eftir børnum, ið gráta eftir kjøti í føstu"
- Í føstu varð ikki dansað, tí eru føstulávintsmánadagur og 2. Páskakvøld, hvør sínumegin føstuna, tiltikin dansikvøld
- Gamalt er, at mánadag í føstugangi skulu allir trælir hava frí
- Føstuinngangur er fyrsta sunnudag eftir fyrstu tendring eftir kyndilsmessu
- Føstan endar páskadag, tá Jesus reis upp frá deyðum, og tað var somuleiðis fyrsti kjøtdagur eftir føstuna

*Gamla føstan hevði nógv av teimum tingunum, sum vit í dag rinda serfrøðingum dýrt fyri at hjálpa okkum við. Tey ótu heilsugóðan kost við máta, serliga fisk, tey halgaðu morgnarnar til tað andaliga ella spirituella, og tey merktu lívið og egnar tankar*